# Ein gøla at fólk fingu løn fyri at ganga heima

**Hetta er onki minni enn ein skandala, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, um málið um Serdagsstovnin á Argjum, har seks starvsfólk vórðu sett í starv og hava fingið løn seinastu mongu mánaðirnar, hóast stovnurin ikki er til enn**



SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

– Slíkt eigur ikki at koma fyri og eg fari at seta meg í samband við Almannastovuna beinanvegin, so vit kunnu fáa greiði á, hvussu tað kundi henda, at fólk verða sett í starv, áðrenn húsini til stovnin eru klár, sigur landsstýrismaðurin við Sosialin.

Hann sipar til málið, sum varð umrøtt í blaðnum í gjár, har vit skrivaðu, at 839.652 almennar krónur higartil eru farnar til lønir og húsaleigu til Serdagstovnin á Argjum, hóast stovnurin als ikki er farin at virka enn.

Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, segði, at talan hevur verið um eina samanrenning av óhepnum hendingum, sum seinkaðu stovninum, ið upprunaliga skuldi latið upp 1. mai, men nú hevur verið áleiðis í fimm mánaðir longri.

**Ov hart press**

Hans Pauli Strøm sigur, at tað als ikki kann góðtakast, at 840.000,- krónur fara fyri skeyti á hendan hátt.

– Peningur, sum kundi verið nýttar so nógv skilabetri innan almannaøkið, har tað frammanundan er ilt at fáa játtanina at røkka, staðfestir landsstýrismaðurin. Og sigur seg undrast á mannagongdirnar hjá Almannastovuna í hesum málinum, tí tað hevur altíð hevur verið vanligt, at húsini til stovnar eru fingin til vega, áðrenn hann verður mannaður.

– Tað hava uttan iva verið umstøður í hesum førinum, har mett hevur verið, at tað var neyðugt at manna stovnin skjótari enn vanligt. Og har skal eg als ikki taka meg sjálvan frían, tí eg havi kanska pressað í so hart á at fáa stovnin upp at koyra, sigur Hans Pauli Strøm.

**Pistól fyri tinningin**

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at hann ímyndar sær, at Almannastovan hevur ikki havt vanligar arbeiðsumstøður, júst í málinum um serdagstovnin til børn við atferðatrupulleikum.

Og hann vísir á, at í fyrsta lagi hevur hann givið til kennar, at málið hevur skund, og harumframt er tað eingin loyna, at tað nærum var ein fólkakrav at fáa eitt tilboð til hesi børnini skjótast gjørligt. Tí ímyndar hann sær, at trýstið hevur verið so stórt, at Almannastovan hevur gjørt av at seta fólkini í starv sum skjótast, so tann parturin av tilgongdini ikki varð darvandi.

– Tá avgerðir verða tiknar við einum pistóli fyri tinningin og í skundi, er skjótt at taka skeivar avgerðir, sigur Hans Pauli Strøm, sum samstundis sigur, at tað var skeivt at seta fólk í starv longu 1. mai, hóast leigusáttmálin ikki var undirskrivaður fyrr enn 12. juni.

**Eykajáttan mátti til**

– Tað er ikki minst ørkymlandi, tá hugsað verður um alt rokið, ið var um stovnin fyri nøkrum mánaðum síðani. Málið hevði so stóran skund tá, at eykajáttan mátti til, og tað er uppaftur meira syndarligt, tá hugsað verður um, at hetta er eitt øki, sum frammanundan verður politiskt undirmett og sum tað er ómetaliga torført at fáa pening til.

**Ongar avleiðingar**

Men hvørjar verða avleiðingarnar av hesum? spyrja vit Hans Paula Strøm.

– Eg átaki mær ein part av ábyrgdini fyri, at tað kom so vítt, og eg fari ikki at hanga nakran. So málið fær ongar beinleiðis avleiðingar, hóast tað sjálvsagt ger, at tað framyvir hevur við sær, at tað verður torførari hjá mær og ráðnum at argumentera fyri at fáa pening til nýggj tiltøk, tá vit í hesum førinum hava prógvað, at vit ikki hava gjørt okkara heimaarbeiði nóg gott, sigur ein harmur landsstýrismaður at enda.

# Flapsflogfarið flýgur aftur

**Tvær ferðir innan fyri fýra dagar, hevði Atlantic Airways trupulleikar við bremsuskipanini á einum av flogførum teirra. Hetta flogfarið er nú aftur í flúgving eftir at hava verið til kanningar í Bergen**

FLÚGVING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Flogfarið hjá Atlantic Airways, sum tvær ferðir innan fyri fýra dagar hevði trupulleikar við bremsuskipanini, teimum sonevndu flapsunum, er nú aftur í flúgving.

Eftir seinna tilburðin, har flapsarnir ikki komu út, tá flogfarið skuldi lenda, varð flogfarið aftur tikið úr flúgving og sent til Bergen, har tað varð gjøgnumgingið og kannað.

Sunnudagin varð flogfarið so royndarflogið, og tá alt gekk sum tað skuldi, var tað góðkent. Sunnukvøldið var flogfarið aftur í Føroyum og kundi fara undir vanliga rutuflúgving aftur.



## Nógvur tónleikur í Manhattan

Rókur og Rúni, Uni Debess Band, Líggjas og Flóvin, og Jens Marni er røðin av stjørnunøvnum, ið hetta vikuskiftið spælir í Manhattan.

Rókur Jakobsen og Rúni Eysturlíð leggja fyri hóskvøldið, fríggjakvøldið spælir Uni Debess við bólki og leygarkvøldið verður høvið at hoyra Deja Vu sangararnir Líggjas Olsen og Flóvin E. Viderø. Eisini sunnukvøldið er tónleikur á skránni í Manhattan tá fer Showmaðurin og fyrrverandi All That Rain sangarin Jens Marni Hansen at undirhalda.

**nud**

## Kazuu á pallin í Havn

Maðurin handan løgini hjá Aria, Magni Husgaard er saman við popp hetjuni úr Hjarnum Karl Martini Samuelsen, Kazuu. Leygarkvøldið spæla teir í Glitnir.

Hetta eru tvey ymisk ættarlið av klaksvíkstónleikarum, ið hava funnið saman. Teir hava áður framført í Glitnir við sínum dansitónleiki. Seinastu tíðina hava teir eisini saman við øðrum klaksvíkstónleikarum mynda bólkin Pentagon. Men hetta vikuskiftið er tað aftur Kazuu, ið fer á pallin.

Tað man vera lítil ivi um, at okkurt Hjarnar lag verður millum løgini, ið teir spæla.

Fríggjakvøldið er Glitnir sum vant karaokebarr, úr Glitnir verður sagt, at tey júst hava fingið 400 nýggjar karaoke sangir, so nú eru 800 sangir at velja ímillum.

**nud**